# Rundskriv
# um
# keyp av vørum og tænastum

# Ársfrágreiðing 2014

**Juli 2015**

# Innihald

1. Inngangur ..................................................................................................... 3

2. Samandráttur, niðurstøður og tilmæli ..................................................................... 3

3. Innkeyps- og útboðspolitikkurin hjá landinum ............................................................ 5

4. Alment útboð ................................................................................................... 6

5. Tilboðsfyrispurningar .......................................................................................... 8

6. Vekting og krøv ................................................................................................ 9

7. Kærur ........................................................................................................... 11

8. Vegleiðingar og ráðgeving ................................................................................... 12

9. Viðmerkingar til rundskriv og Keypsportalin ............................................................. 13

10. Tilmæli um tillagingar í rundskrivi og Keypsportali ................................................... 14

# 1. Inngangur

Sambært punkt 11 í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum hjá landinum, skal Fíggjarmálaráðið gera ársfrágreiðing um keypsvirksemið hjá landinum. Ársfrágreiðingin verður almannakunngjørd á Keypsportalinum.

Rundskrivið kom í gildi 1. oktober 2013, og hetta er fyrsta ársfrágreiðingin, sum fevnir um árið 2014 umframt síðsta ársfjórðingin í 2013.

Í frágreiðingini er yvirlit yvir allar útbjóðingar, ið eru bodnar út umvegis Keypsportalin í nevnda tíðarskeiði, umframt teir tilboðsfyrispurningar, sum Keypsportalurin hevur skrásett. Frágreiðingin viðgerð royndirnar higartil við rundskrivinum og almenna innkeypspolitikkinum yvirhøvur. Komið verður við tilmælum um tillagingar og broytingar í rundskrivinum, nú rundskrivið hevur verið galdandi í meira enn eitt ár.

# 2. Samandráttur, niðurstøður og tilmæli

Síðan 1. oktober 2013 hevur keyp av vørum og tænastum hjá landinum, omanfyri 50.000 kr. verið fevnt av rundskrivi, sum ásetir tveir hættir at bjóða út vørur og tænastur.

Tann eini útboðshátturin er at bjóða út umvegis tilboðsfyrispurning, sum skal sendast í minsta lagi tveimum veitarum. Tilboðsfyrispurningar verða brúktir til keyp, sum liggja ímillum 50.000 og 800.000 kr. Hin útboðshátturin er alment útboð, sum skal lýsast á Keypsportalinum. Alment útboð skal nýtast fyri keyp omanfyri 800.000 kr., men tey flestu útboðini á Keypsportalinum hava tó ligið væl niðanfyri 800.000 kr.

Hóast tað ikki finst eitt fullfíggjað yvirlit yvir tilboðsfyrispurningarnar, so geva almennu útboðini á Keypsportalinum eina greiða ábending um, at landið sparir væl av peningi við at bjóða út vørur og tænastur.

Síðan rundskrivið kom í gildi og Keypsportalurin fór at virka 1. oktober 2013 til árslok 2014, keypti landið fyri smáar 30 mió. kr. umvegis 26 útboð á Keypsportalinum. Tilsamans 115 boð komu til hesi 26 útboðini. Spjaðingin í tilboðunum vísir, at í ringasta føri var hægsta boð næstan 6 ferðir dýrari enn tilboðsvinnarin. Tilsamans hava prísirnir hjá tilboðsvinnarunum verið umleið 20% lægri enn prísirnir á hægstu boðunum hetta tíðarskeiðið.

Rundskrivið og Keypsportalurin hava sum heild verið væl móttikin, men tað hava sjálvandi verið spurningar og ivamál, tí tað krevur eina ávísa tíð at venja seg við nýggju

reglurnar. Flestu ivamálini hava snúð seg um vekting, og at skilja í millum vektir og krøv, tá ið bjóðað verður út.

Í innkeypspolitikkinum verður lagt upp til, at stór vekt eigur at verða løgd á prísin. Tí verður mælt til, at prísurin í minsta lagi vektar 50% av samlaðu vektingini í hvørjum einstøkum útboði, og eingi einstøk viðurskifti eiga at verða vektaði minni enn 5%. Í fleiri førum hevur tað víst seg, at ymisk viðurskifti hava hóskað seg betur sum krøv enn sum vektir, og útboðini eru tá vorðin greiðari og einfaldari at fáast við.

Tað er tí týdningarmikið at strika undir, at sleppast kann undan flestu misskiljingunum, um útbjóðarar og veitarar tryggja sær, at partarnir hava skilt hvønn annan, áðrenn veitararnir fara í holt við at fyrireika tilboð, tí tá slepst undan, at avgerðir verða tiknar á skeivum grundarlag, og at misskiljingar koma fram, eftir at avgerð er tikin um, hvør fær vann útboðið.

Í rundskrivinum er ongin áseting um at kæra avgerðir um keyp av vørum og tænastum til nakran kærumyndugleika. Kærast kann til avvarðandi stjórnarráð. Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at stórur almennur áhugi, serliga hjá fjølmiðlunum, er fyri útboðunum hjá landinum, og hesin áhugin hevur virka bæði stimbrandi og mennandi fyri mannagongdirnar og keypsreglurnar hjá landinum. Almenningurin hevur soleiðis eftirlit við, at landið bjóðar út og keypir samsvarandi reglunum.

Vinnan hevur fáar viðmerkingar um tillagingar við rundskrivinum og Keypsportalinum. Onkrar handilsfyritøkur hava víst ónøgd við, at lýsingar av útboðsvinnara á Keypsportalinum kann elva til óneyðugar spurningar frá øðrum kundum.

Nakrir KT-veitarar ynskja at fáa markið fyri KT- veitingar á 800.000 kr. strikað, soleiðis at allar KT-veitingar verða bjóðaðar út sambært vanligu reglunum í rundskrivinum.

Flestu útboðini á Keypsportalinum hava ligið væl undir markið á 800.000 kr. Mælt verður tí til at seta markið, fyri at vørur og tænastur skulu bjóðast út á Keypsportalinum, niður á 250.000 kr. Hetta verður eisini galdandi fyri KT-veitingar, soleiðis at KT-veitingar omanfyri 250.000 kr. skulu bjóðast út á Keypsportalinum.

Annars eru ongar viðmerkingar komnar um, at tað eru álvarsligir feilir og manglar við rundskrivinum og Keypsportalinum. Reglurnar um keyp av vørum og tænastum hjá landinum eru framvegis rættiliga nýggjar, og landið er tí enn í einari tilvenjing at byggja upp eina veruliga keypsmentan. Mælt verður tí frá at gera størri broytingar í rundskrivi og Keypsportali.

Onkrar smærri tillagingar eiga tó at verða gjørdar í rundskrivinum viðvíkjandi minstamarki fyri útboð og prísvekt, og við atliti at stóra almenna áhuganum fyri Keypsportalinum, verður mælt til eggja kommunum at nýta Keypsportalin, eins og byggiverkætlanir landsins[1] eisini eiga at verða bodnar út umvegis Keypsportalin . Partar av onkrur byggiverkætlanum hava longu verið bodnar út á Keypsportalinum.

# 3. Innkeyps- og útboðspolitikkurin hjá landinum

Upprunin og grundarlagið fyri rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum og Keypsportalinum er frágreiðing um innkeyps og útboðspolitikk hjá landinum[2], ið ein arbeiðsbólkur undir Vinnumálaráðnum lat úr hondum í mars 2012.

Í frágreiðingini varð víst á, at bæði tað almenna og vinnan leingi høvdu sóknast eftir einari skipaðari tilgongd til keyp av vørum og tænastum hjá tí almenna. Tað almenna brúkar á hvørjum ári ein munandi part av skattainntøkunum til at keypa vørur og tænastur fyri, og tað almenna hevur skyldu at brúka pening skattgjaldarans skynsamt.

Í frágreiðingini stendur eisini, at grundhugsjónin í øllum keypi hjá tí almenna byggir á tríggjar meginreglur, sum eru galdandi fyri alt keyp hjá tí almenna, líka mikið, hvør keypsháttur verður brúktur.

Meginreglurnar eru:

1. Virði fyri pening
2. Gjøgnumskygni
3. At fremja virkna kapping

Fyrsta meginreglan snýr seg um, at tað almenna altíð skal umsita pening skattgjaldarans, soleiðis at mest møguligt fæst fyri peningin, ið keypt verður fyri. Í øðrum lagi skulu keypsmannagongdirnar verða skipaðar við størst møguligum gjøgnumskygni, soleiðis at øll kunnu líta á, at almenn keyp eru ópartísk, rættvís, saklig og sýna opinleika. Í triðja lagi skal tað almenna vera við til at stimbra kappingina á privata vøru- og tænastumarknaðinum.

[1] Rundskrivið um keyp av vørum og tænastum er ikki galdandi fyri byggiverkætlanir. Fyri byggiverkætlanir er licitiatiónslógin galdandi. (Løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m.)

[2] Vinnumálaráðið: “Innkeyps- og útboðspolitikkurin hjá landinum fyri keyp av vørum og tænastum” mars 2012.

Tað skal viðmerkjast, at í tilgongdini at gera keypspolitikk fyri tað almenna ynsktu kommunurnar ikki at verða fevndar av hesum. Tískil eru ásetingarnar um keypspolitikkin gjørdar í rundskrivi, sum bert er galdandi fyri keypsvirksemið hjá landinum

Innihaldið og ásetingarnar í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum eru grundaðar á meginreglurnar omanfyri. Í rundskrivinum eru ásettir tveir hættir at bjóða út keyp av vørum og tænastum, annar er alment útboð og hin er tilboðsfyrispurningur.

# 4. Alment útboð

Sambært punkt 4.2 í rundskrivinum, skal alment útboð verða nýtt sum keypsháttur fyri keyp omanfyri 800.000 kr. u/mvg[3]. Almenn útboð verða lýst á Keypsportalinum, soleiðis at allir áhugaðir veitarar fáa høvi at geva boð upp á vøruna ella tænastuna, sum verður boðin út.

Talva 4.1 vísir, at landið frá 1. oktober 2013 til 31. desember 2014 hevur keypt fyri smáar 30 mió. kr. umvegis 26 útboð á Keypsportalinum. Tilsamans 115 boð komu inn til hesi 26 útboðini. Vert er at leggja til merkis, at bert 7 av teimum 26 útboðunum, ið vórðu avgreidd umvegis Keypsportalin, vórðu omanfyri 800 tús. kr., sum er kravið fyri at útboðið skal lýsast á Keypsportalinum.

Verður hugt eftir spjaðingini millum hægsta og lægsta boð í talvu 4.1, so kann staðfestast, at landið hevur spart pening við at bjóða út vørur og tænastur umvegis Keypsportalin. Í einstøkum føri var hægsta boð næstan 6 ferðir dýrari enn tilboðsvinnarin. Í teimum 23 útboðunum, har bæði tilboðsvinnari og hægsta boð eru upplýst, er samlaði munurin 4,7 mió. kr. Hetta merkir, at samanlagt hava prísirnir hjá tilboðsvinnarunum verið umleið 20% lægri enn dýrastu tilboðini.

Tilsamans 11 stjórnarráð og stovnar eiga hesi 26 útboðini, sum vórðu boðin út á Keyps-portalinum frá 1. oktober 2013 til 31. desember 2014. Útboðini eru býtt soleiðis á stjórnarráð og stovnar:

- KT-Landsins 6
- Landsverk 5
- Landssjúkrahúsið 4
- Almannaverkið 2
- Fíggjarmálaráðið 2

[3] Alment útboð kann eisini verða nýtt til keyp undir 800.000 kr. u/mvg.

- Skráseting Føroya 2
- Fróðskaparsetrið 1
- Løgmansskrivstovan 1
- Mentamálaráðið 1
- Strandferðslan 1
- Vinnumálaráðið 1

**Talva 4.1: Útboð á Keypsportalinum frá 1. oktober 2013 til 31. desember 2014.**

| Heiti | Útbjóðari | Tilboð[4] | Vinnari[5] kr. | Hægsta[6] boð kr. |
|---|---|---|---|---|
| Koyring til og frá flogvøllinum | Landssjúkrahúsið | 4 | 700.000 | 1.200.000 |
| 25 farteldur | KT-Landsins | 4 | 139.500 | 203.150 |
| Eftirlit við ársfrásøgnum | Skráseting Føroya | 6 | 90.000 | 200.000 |
| Oljuveiting til Landssjúkrahúsið | Landssjúkrahúsið | 2 | 5.635.000 | |
| 50 farteldur | KT-Landsins | 6 | 297.450 | 483.000 |
| Fartelefoni hjá miðfyrisitingini | Fíggjarmálaráðið | 1 | 1.256.400 | 1.256.400 |
| Køksútbúnaður til Tekniska Skúlan í Klaksvík | Landsverk | 3 | 1.645.618 | 1.728.370 |
| Dokklisti fyri M/F Sildberan | Strandferðslan | 2 | 3.900.000 | 5.097.366 |
| Prenting o.a. av próvtøkuuppgávum | Mentamálaráðið | 3 | 87.770 | 155.000 |
| Felags heimasíða til Føroya Landsstýri | Løgmansskrivstovan | 9 | 72.300 | 420.000 |
| Grannskoðan av almennum partafelag | Fíggjarmálaráðið | 3 | 17.600 | 50.000 |
| Eftirlit við el viðlíkahaldi í tunlum | Landsverk | 4 | 152.280 | 215.000 |
| Bitumen | Landsverk | 2 | 9.441.453 | 9.573.391 |
| Koyring av blóðgevum og dialysusjúklingum | Landssjúkrahúsið | 7 | 600.000 | 1.075.000 |
| 30 farteldur | KT-Landsins | 4 | 197.400 | 283.470 |
| Grannskoðan av Visit Faroe Islands | Vinnumálaráðið | 2 | 28.500 | 34.000 |
| 15 farteldur | Fróðskaparsetrið | 4 | 86.931 | 119.839 |
| Køkar, innbúgv o.a. til sambýli | Landsverk | 12 | 791.485 | 1.041.610 |
| Flutningur til og úr Føroyum | Landssjúkrahúsið | 6 | 1.600.000 | |
| Kaðalrør og muffur | Landsverk | 7 | 70.350 | 200.869 |
| 100 teldur | KT-Landsins | 4 | 280.160 | 331.000 |
| 20 ultrabook teldur | KT-Landsins | 4 | 166.500 | 186.000 |
| 30 farteldur | KT-Landsins | 4 | 188.130 | 243.060 |
| Eftirlit við ársfrásøgnum | Skráseting Føroya | 6 | 80.000 | 150.000 |
| Reingerð | Almannaverkið | 4 | 396.600 | 1.095.000 |
| Oljuveiting til Almannaverkið | Almannaverkið | 2 | 1.796.295 | |
| **Tilsamans** | | **115** | **29.717.722** | |

[4] Talið av tilboðsveitarum, ið hava bjóðað upp á ávísu útbjóðingina.
[5] Kostnaðurin á tilboðnum, ið hevur vunnið útboðið.

# 5. Tilboðsfyrispurningar

Sambært punkt 4.1 í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum, kann tilboðsfyrispurningur verða nýttur sum keypsháttur, fyri keyp omanfyri 50.000 kr. og upp til 800.000 kr. Tá verður kravt, at tilboð skulu biðjast frá í minsta lagi tveimum veitarum.

Tilboðsfyrispurningar verða ikki lýstir á Keypsportalinum, men sambært punkt 9 í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum, skulu allir tilboðsfyrispurningar fráboðast Keypsportalinum.

Hóast Keypsportalurin hevur mint stovnsleiðarar á at fráboða sínar tilboðsfyrispurningar, so eru helst ikki allir tilboðsfyrispurningar fráboðaðir Keypsportalinum. Endamálið við fráboðanunum er at savna royndir og hagtøl hjá landinum at bjóða út á einum stað, soleiðis at Keypsportalurin kann brúka royndirnar at vegleiða stovnum og stovnsleiðarum í at seta upp tilboðsfyrispurningar.

Talva 5.1 vísir yvirlit yvir tilboðsfyrispurningar, sum eru fráboðaðir Keypsportalinum frá 1. oktober 2013 til 31. desember 2014. Talvan vísir, at tað vórðu fráboðaðir Keypsportalinum tilsamans 24 tilboðsfyrispurningar hetta tíðarskeiðið.

Tað eru helst framd fleiri keyp umvegis tilboðsfyrispurningar, enn hesi 24, sum eru fráboðaði Keypsportalinum. Vónandi fer tað í 2015 at ganga betur at fáa tilboðsfyrispurningar fráboðaðar Keypsportalinum, men um støðan ikki batnar hesum viðvíkjandi, má støða takast til møguligar broytingar í rundskrivinum. Landið er framvegis í einari tilvenjing við nýggju keypsreglunum, og tí er ikki ráðiligt at gera størri broytingar enn. Mælt verður tí til at lata eitt ár ganga, áðrenn møguligar broytingar verða gjørdar í rundskrivinum viðvíkjandi skráseting av tilboðsfyrispurningum.

Formliga er ikki stórvegis munur á innihaldinum í tilboðsfyrispurningi og almennum útboði. Tað hevur tó týdning at gera sær greitt, at keyparin óbeinleiðis hevur undangóðkent veitararnar, tá ið keypt verður umvegis tilboðsfyrispurning, tí keyparin avger sjálvur, hvønn hann metir kann bjóða upp á vøruna ella tænastuna, tá ið hann sendir út tilboðsfyrispurningar.

[6] Kostnaðurin á hægsta útboðnum, ið hevur verið við í útbjóðingini.

**Talva 5.1: Skrásettir tilboðsfyrispurningar frá 1. oktober 2013 til 31. desember 2014.**

| Heiti | Útbjóðari | Tilboð | Tilboðsvinnari |
|---|---|---|---|
| 10 ultrabook farteldur | TAKS | 3 | 79.300 |
| Bilur við skrárampa | Landsverk | 3 | 520.000 |
| 40 farteldur | Føroya Studentaskúli og HF-skeið | 6 | 225.000 |
| 5 tons gravimaskina | Landsverk | | 400.000 |
| Bilar til kontóri | Landsverk | 5 | 488.000 |
| Blásikølari/frystiboks | Landssjúkrahúsið | 2 | 98.843 |
| Dumparadekk | Landsverk | 3 | 69.900 |
| Vegvísaraskeltir | Landsverk | 3 | 360.538 |
| Tilfar til vegristir | Landsverk | 2 | 243.470 |
| Prenting av fíggjarlógaruppskotið o.ø. | Fíggjarmálaráðið | 2 | 74.800 |
| 2 Pick Up bilar | Landsverk | 5 | 477.496 |
| 2 vørubilar | Landsverk | 4 | 342.000 |
| Ultraljóðslegur | Landssjúkrahúsið | 2 | 43.994 |
| Teknisk útgerð til undirvísing | Føroya Studentaskúli og HF-skeið | 4 | 362.422 |
| Oljuveiting og tænastur | Føroya Studentaskúli og HF-skeið | 2 | |
| Mannskapsbilur | Landsverk | | 340.000 |
| Skrivstovuinnbúgv ti projektkontór | Landsverk | 3 | 68.625 |
| Farteldur og borðteldur | Landssjúkrahúsið | 2 | |
| Logitech tastatur og borðteldur | TAKS | 4 | 28.415 |
| Røntgenverja | Landssjúkrahúsið | 2 | 99.993 |
| Ovnur til stórkøk | Landssjúkrahúsið | 2 | 69.742 |
| Tráðleyst KT-net | Landssjúkrahúsið | 2 | 406.000 |
| Telduútbúnaður til Vinnumálaráðið | Vinnumálaráðið | | |
| Kopimaskinur | Søvn Landsins | | |
| **Tilsamans** | | **61** | **4.798.538** |

# 6. Vekting og krøv

Stóru avbjóðingarnar við almennu útboðunum og tilboðsfyrispurningunum hava víst seg at verið vekting, og at skilja ímillum vekting og krøv.

Rundskrivið um keyp av vørum og tænastum leggur heilt týðiliga upp til, at stór vekt eigur at verða løgd á prísin. Víst verður til orðingarnar í rundskrivinum, bæði viðvíkjandi almennum útboði og tilboðsfyrispurningi, har tað stendur soleiðis: “Um tað ikki bert er prísurin, men eisini onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri, hvat tilboð verður valt, eigur

greitt at verða tilskilað, hvussu nógv ymsu viðurskiftini vekta í samlaðu metingini av tilboðnum.”

Hóast stór vekt eigur at verða løgd á prísin, so merkir hetta ikki, at dygd og onnur viðurskifti ikki eisini kunnu hava stóran týdning fyri, hvør vinnur útboðið. Málið eigur altíð at vera at taka av besta tilboðnum. Besta tilboðið er úrslitið av einari samlaðari meting, har mest møguligt fæst fyri peningin.

Niðanfyri er dømi um útboð av konsulentuppgávu, har prísurin (tímakostnaðurin) vektar helvtina. Hin helvtin av vektingini er býtt á royndir, útbúgving og førleikar. Stigini verða givin á tann hátt, at tann, ið hevur lægsta tímakostnaðin fær 100% av prísvektini, sum telur 50% av samlaðu vektingini. Á sama hátt fær tann, ið samanlagt verður mettur at verða bestur innan royndir, útbúgving og førleikar 100% av vektingini hesum viðvíkjandi.

Viðvíkjandi royndum, útbúgvingum og førleikum verður vektað innanhýsis, har stig (frá 1 til 10) verða givin fyri ymsu parametrini í hesi vektingini. Í døminum niðanfyri fær tilboð A 6,1 stig, tilboð B fær 7,6 stig og tilboð C fær 8 stig. Tilboð C fær sostatt 100% fyri royndir, útbúgving og førleikar. A og B fáa síðan lutað % stig í mun til C.

Fyri prísin (tímakostnaðin) er sama meginregla galdandi. Tilboð A fær 100%, tí tilboð A hevur lægsta tímakostnaðin. Fyri at sleppa undan ósakligum tilboðum (prísdumping), ber til at seta eitt minstamark á tímakostnaðin í vektingini. Í døminum niðanfyri er konsulent-tímalønin á 450,00 kr. í BLF-sáttmálanum nýtt sum minstamark fyri tímakostnaðin. Hetta merkir, at øll boð undir 450 kr. um tíman, verða vektað við 450 kr. um tíman.

| | | Tilboðsgevarar | | |
|---|---|---|---|---|
| **Royndir, útbúgving og førleikar (50%)** | **Vekting** | **A** | **B** | **C** |
| Leiðsluførleikar | 40% | 4 | 7 | 10 |
| Arbeiðsroyndir | 30% | 9 | 6 | 10 |
| Annað | 20% | 5 | 10 | 4 |
| Viðkomandi hægri útbúgvning | 10% | 8 | 10 | 2 |
| | 100% | 6,1 | 7,6 | 8,0 |
| | | **76,25** | **95,00** | **100** |
| | | | | |
| **Tímakostnaður (50%)** | | 450 | 500 | 550 |
| | | **100** | **88,89** | **77,78** |
| | | | | |
| | **prís/eginleikar** | | | |
| **Tilboðsvinnari** | **50/50** | **88,13** | **91,94** | **88,89** |

Í døminum fær tilboð B samanlagt 95,00*0,5+88,89*0,5=91,94 og vinnur útbjóðingina, hóast tilboð B hvørki hevði lægsta prís ella bestu royndir, útbúgving og førleikar.

Um onnur viðurskifti verða mett at hava stóran týdning, so eigur at virkast fyri, at hesi heldur verða tikin við sum krøv í útbjóðingini. Sum dømi um krøv kunnu nevnast veitingarfreist og ynsktir eginleikar.

Tað hevur tó altíð stóran týdning, bæði tá ið tað snýr seg um vekting og tá ið tað snýr seg um krøv, at vektingin og krøvini eru objektiv.

Í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum, og frágreiðingini um innkeyps- og útboðspolitikkin verður víst á stóra týdningin av, at partarnir hava skilt hvønn annan, áðrenn veitararnir fara í holt við at fyrireika tilboðið, tí tá slepst undan, at avgerðir verða tiknar á skeivum grundarlag, og at misskiljingar koma fram eftir, at avgerð er tikin um, hvør vann útboðið. Tí hevur tað stóran týdning, at veitarar fáa eina hóskandi freist at seta spurningar til innihaldið í tilboðsfyrispurninginum.

# 7. Kærur

Undir punkt 10 í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum er ásett, at stjórnarráðini hava ábyrgdina av, at stovnar fylgja rundskrivinum. Kærur, um at stovnar ikki fylgja ásetingunum, verða viðgjørdar av avvarðandi stjórnarráð.

Tað er bert komin inn ein skrivlig kæra, síðan rundskrivið kom í gildi 1. oktober 2013. Tað var Almannaverkið, sum í november 2013 varð kært í sambandi við keyp av skrivstovuinnbúgvi. Almannaverkið hevði sent út tilboðsfyrispurningar til tríggjar veitarar av skrivstovu innbúgvi. Almannaverkið fekk tilboð frá øllum trimum veitarunum, men tók ikki av lægsta tilboðnum. Veitarin, ið átti lægsta tilboðið, kærdi beinanvegin avgerðina hjá Almannaverkinum, men kæran fekk eina serstakliga klombruta og óneyðuga drúgva viðgerð, áðrenn Fíggjarmálaráðið fekk málið at avgreiða og gjørdi eina endaliga niðurstøðu. Kærumálið liggur á heimasíðuni hjá Keypsportalinum.

Í niðurstøðuni í kærumálinum stendur soleiðis: "Almannaverkið átti at havt tryggjað sær, at partarnir høvdu skilt hvønn annan, áðrenn avgerð varð tikin um tilboðini. Almannaverkið átti at havt tikið av tilboðnum frá veitaranum við lægsta tilboðnum, tí tað kann ikki sigast, at stórvegis munur er á sniðinum, men prísmunurin var stórur. Almannaverkið kundi allarhelst havt tikið nýggja avgerð í málinum, tá ið kærarin bað Almannaverkið um hetta, men nú er so langt fráliðið, at tað ber neyvan til at broyta avgerðina uttan at hetta fær stórar fíggjarligar avleiðingar fyri Almannaverkið. Vit kunnu tí ikki annað enn læra av mistøkunum, sum eru gjørd í hesum tilboðsfyrispurninginum, soleiðis at tey ikki verða endurtikin."

Eitt líknandi mál kom fram í fjølmiðlunum í november 2014. Tá hevði TAKS sent út tilboðsfyrispurning til tríggjar veitarar um skrivstovuinnbúgv. Allir lótu inn tilboð, men TAKS valdi at taka av dýrasta tilboðnum, ið var nógv dýrari enn lægsta tilboðið. Fíggjarmálaráðið visti einki um hetta málið, fyrr enn tað kom alment fram í fjølmiðlunum, har tað fekk drúgva viðgerð. Stovnurin hevði stórar trupulleikar við at verja sína avgerð, og stovnurin valdi tí at taka avgerðina aftur, og bjóða skrivstovu innbúgvið út av nýggjum á Keypsportalinum, samsvarandi ásetingunum í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum.

# 8. Vegleiðingar og ráðgeving

Samsvarandi punkt 7 í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum, er skipað eitt toymi við fólki, ið hava drúgvar royndir at bjóða út vørur og tænastur, sum skal vegleiða um keyp og útboðshættir. Toymið skal eisini gera tilmæli viðvíkjandi fyrispurningum um undantøk. Toymið telur 10 persónar.

Tað hava ikki verið løgd nógv mál fyri toymið, sum hevur havt nakrar fáar fundir. Tað hevur eisini víst seg at verið rættiliga tungt at skipa og savna vegleiðingina í eitt so stórt toymið, har einstøku toymislimirnir sita spjaddir runt í sjtórnarráðum og stovnum hjá landinum.

Fíggjarmálaráðið hevur tí staðið fyri meginpartinum av vegleiðingini og ráðgevingini í sambandi við tilboðsfyrispurningar og útboð.

# 9. Viðmerkingar til rundskriv og Keypsportalin

Tá ið fyrivarni verður tikið fyri tilvenjing og spurningum í tí sambandi, so hava ikki verið stórvegis trupulleikar hjá stovnum og stjórnarráðum at umsita útboð samsvarandi rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum.

Fíggjarmálaráðið hevur bert fingið fáar beinleiðis áheitanir frá vinnuni um at gera broytingar í rundskrivinum. Ein er frá 12 KT-veitarum, sum heita á Fíggjarmálaráðið um at strika undantakið í punkt 6, har tað er ásett, at rundskrivið ikki er galdandi fyri KT-veitingar, har virðið á sáttmálanum er undir 800.000 kr.

Vinnuhúsið hevur víst á, at tað samsvarandi almenna útboðs- og innkeypspolitikkinum átti at staðið í rundskrivinum, at almennir stovnar regluliga gjøgnumganga uppgávur sínar fyri at meta um, hvørjar uppgávur egna seg at verða veittar út.

Almennir stovnar eiga áhaldandi at kanna eftir, um teir hava virksemi og uppgávur, sum hóska seg at verða veittar út, men mælt verður ikki til at gera nakra broyting í rundskrivinum hesum viðvíkjandi, tí landið framvegis er í einari tilvenjing at byggja upp eina veruliga keypsmentan.

Vinnuhúsið ynskir eisini tillagingar í lýsingunum av útboðsvinnarum á Keypsportalinum. Fleiri handilsfyritøkur hava vent sær til Vinnuhúsið viðvíkjandi lýsingunum av útboðsvinnara á Keypsportalinum, tí lýsingarnar hava í fleiri førum skapt óneyðuga nógvar spurningar frá øðrum kundum hjá handilsfyritøkuni, sum vann útboðið. Spurningarnir koma, tá ið samlaði prísurin verður lýstur fyri eitt ávíst tal av einari vøru uttan nærri upplýsingar um vøruna. Tá er tað komið fyri, at vinnandi handilsfyritøkan brúkti nógva tíð og orku at greiða øðrum kundum frá smálutunum í tilboðnum.

Mælt verður til at halda fast um at lýsa prísin hjá vinnaranum á Keypsportalinum, tí hetta verður mett at vera ein rættiliga týðandi partur av almannakunngeringini av tilboðsvinnara.

# 10. Tilmæli um tillagingar í rundskrivi og Keypsportali

Við støði í royndunum higartil og viðmerkingunum til rundskrivi og Keypsportalin verður ikki mælt til at gera størri broytingar í rundskrivinum á hesum sinni. Reglurnar um keyp av vørum og tænastum hjá landinum eru harumframt nýggjar, og landið er tí enn í einari tilvenjing at byggja upp eina veruliga keypsmentan.

Onkrar smærri tillagingar eiga tó at verða gjørdar, og tær eru soljóðandi:

- Flestu útboðini á Keypsportalinum liggja væl undir 800.000 kr., sum er markið fyri at útboð skal bjóðast út umvegis Keypsportalin. Tí verður mælt til at lækka markið fyri útboð á Keypsportalinum niður á 250.000 kr.
- Mælt verður somuleiðis til at lækka undantakið fyri KT-veitingar frá 800.000 kr. niður á 250.000 kr., soleiðis at rundskrivið frameftir verður galdandi fyri KT-veitingar, har virðið á sáttmálunum er omanfyri 250.000 kr.
- Rundskrivið leggur upp til, at stór vekt eigur at verða løgd á prísin. Mælt verður tí til at áseta í rundskrivinum, at prísurin skal vekta í minsta lagi 50%, og at eingi einstøk viðurskifti kunnu vekta minni enn 5%.
- Mælt verður til at eggja kommunum at nýta Keypsportalin, eins og byggiverkætlanir landsins eisini eiga at verða bodnar út umvegis Keypsportalin.